

# Oljuprísurin lækkaði og verður verandi lágur aftaná OPEC-fundin

**Jógvan Hugo Gardar**

07.12.2015 - 08:02

Oljan.fo

Oljumarknaðurin svaraði OPEC-fundinum aftur við at kava enn meir enn hann longu hevði gjørt fríggjadagin.

Oljuframleiðandi londini í OPEC kunngjørdu fríggjadagin at tey ikki minka um framleiðsluna, hóðast oljuprísurin er lækkaður meir enn 60 prosent síðani á sumri 2014.

Oljuhandlarin Andy Hecht sigur í samrøðu við CNBC News at ábendingarnar sum tey hava vísa at oljuprísurin kemur at liggja beint omanfyri 50 dollarar fyri fatið í seinnu helvt av 2017.

Í morgun verður Norðsjóvaroljan Brent seld fyri 42,75 dollarar fyri fatið, meðan amerikanska léttoljan WTI verður seld fyri 39,60 dollarar fyri fatið.

Oljugoymslurnar eru á tremur, samstundis sum framleiðslan er munandi hægri enn tað marknaðurin klárar at svølgja. Oljuhandlarin Anthony Grisanti í GRZ Energi sigur við CNBC News at tað kemur at taka langa tíð áðrenn marknaðurin klárar at svølgja tað sum er av framleiðslu og á goymslu, og tað ger at millum oljuhandlarar er eingin ivi um at oljuprísurin kemur at liggja á einum lágum støði í langa tíð. Long tíð í hesum førinum merkir í øllum førum eitt til tvey ár.